MÁLTEIGURIN

Fyrra-æ

Í einari enn óprentaðari søgu finna vit hetta brotið:

»Hygg nú her, nú skulu teir útrudda bókstavin a, a sum í mamma, hesum vakra orðinum, nú skal vakrasti bókstavurin í alfabetinum eita fyrra æ, tað skal eita klaverkonsert av Mozart í fyrra æ dur, æ, ljótasti bókstavur í alfabetinum, føliur tú ikki, hvussu hann gálvar at tær. Tað eitur ikki mamma longur, nei, tað eitur mæmæ; m fyrra æ mm fyrra æ kann ikki siga annað enn mæ mæ, um teir so goyggja í túsund ár upp móti mánanum, so kann tað ikki siga annað enn mæ mæ. Í framtíðini skulu okkara børn jarma, tá ið tey rópa á mammu sína. Hevur tú nakrantíð hoyrt nakað so ørt, so sinnsjúkt. Nei tú, hasar kálvamuurnar hava ongan musikk í sær, ongan estetiskan sans, tær er í holt við at myrða sítt egna mál. Men hinvegin, tað ger ikki petti, tað ger ikki petti, um okkara mál verður ausradiert og doyr, ikki petti, tað hevur ikki annað uppiborið, tað er bert til fortreð, tað er alt for strævið at hava við at gera, man troyttast, man vil kvalast, tað hevur onga framtíð, tað hevði verið nógv lættari og nemmari fyri okkum øll, um vit settu danskt í staðin fyri. Og so vil eg ikki offra eitt orð upp á hatta forbannaða eddið, bókstavin ð, eitt ljóð, sum ikki er til, sum ikki eksisterar, ein spøkilsisbókstavur, ein gálgalykkja um hálsin, ræðuligt, gysiligt«.

Hvat fara Anna og Sanna og Hanna og Halla og Malla o.s.fr. at siga, tá ið tær fáa at vita, at tær stavast als ikki soleiðis, sum tær halda seg stavast, men Ænnæ, Sænnæ og Hænnæ og Hællæ og Mællæ. Og hvat fara sumbingar at siga, tá ið teir fáa at vita, at tey mergjaðu orðini úr Brestiskvæði »bakkabandið brast« als ikki stavast soleiðis, sum tey stavast, men soleiðis »bækkabændið bræst«.

Ja, soleiðis stavast hesi orðini nú. Men hvør í harrans heilaga navni hevur givið loyvi til, at tey skulu stavast soleiðis? Haldið tykkum nú væl fast: Eingin annar uttan okkara hægstu lærustovnar. Teir hava útruddað bókstavin a, hann er ikki til longur, hann eksisterar ikki, hann skal í staðin fyri eita æ. Okkara háttvirdu málfrøðingar koma við teirri fantastisku grundgeving, at so verður stavsetingin í føriskum nógvar ferðir lættari. Mangt skal man hoyra.

Mál er ikki bara grammatikk og syntaksur, tað er so sanniliga eisini musikkur. Hvat halda tit Mozart hevði sagt, um hann fekk at vita, at vit hava útruddað bókstavin a? Hann hevði brúkt tvey orð: vandalar, barbarar, og so hevði hann sælt víðari.

Tað er líkt til, at okkara háttvirdu málfrøðingar uppfata okkara mál sum ein stóran dunga av krossorðagátum, sum tað er spennandi fyri teir at sita og loysa. At finna upp á nýggjar loynikrókar fyri at gera tað uppaftur meira spennandi og meira torført. Hvat sigur Palliba til tað? Skal hann ongantíð tora at skriva sítt egna mál? Tað er so nógvur ørskapur í føriskari stavseting, at man hevur, sum tann gamli blaðstjórin segði, stundum hug til at »kvetta kík«. Til dømis: Eg lat, men hann læt. Trý, men tríggir. Hvat skal tað til? Tað æt so fitt og vakurt: mentunargrunnur. Knappliga skal tað eita mentanargrunnur. Grammatiskt rætt, gamaní, men hvar fór musikkurin? Eingin í verðini skal nakrantíð fáa meg til at skriva »mentanar« (mentænar).

Tað er so lætt at bøta um føriska stavseting, sum tað kann vera. Útruddið spøkilsisbókstavirnar y og ý. Og latið vera við at hanga hatta forbannaða eddið sum ein hala upp í orðini. Tað er als ikki neyðugt at útrudda hatta eddið, men um tað varð kutað burtur nógvstaðni í endanum, hevði tað hjálpt so ótrúliga væl og gjørt sítt til, at vit kundu hildið lív í okkara máli, sum vit eru so góð við, eitt sindur afturat, og so at okkara góði Palliba eisini slapp uppí. Vit fingu herfyri sendandi eitt sera vakurt lýsingablað inn gjøgnum dyrnar. Har stóð hesin mergjaði setningurin: Nú átta ár á bakið hugfloguið nú takið til eitt slagorð við brakið. Alt í lagi, men hvat er tað ikki synd í hasum eddunum, ið hava kloynt seg so skeivt uppí. Bæði í Spania og Russlandi høvdu tey ein slíkan spøkilsisbókstav, men har hava tey tveitt hann á bláman fyri langari tíð síðan.

Og meðan vit eru her: Stundum er at hoyra tilkomin fólk siga í útvarpi og sjónvarpi »plussiliga, innrømma«. Hetta eru sera vøkur donsk orð, men halga doyð hvat tey rigga illa á føriskum, tú fært ganir av at hoyra tey, ja, ilt fyri hjartað. Vita hesi tilkomnu fólkini ikki, at pludselig eitur nakað so vakurt sum »brádliga« knappliga, alt í einum, snøggliga, snarliga«. Og at innrømma kann eita nakað so vakurt sum »viðganga, játta, ásanna«.

Og eitt hjartasuff afturat, hesa ferð til tykkum á Sosialinum. Tað er stuttligt at síggja hasi vøkru andlitini á baksíðunum hjá tykkum, men tað er ikki altíð so stuttligt at síggja tað, sum stendur niðriundir. Eitt nú »smukke«. Smukke er eitt sera vakurt orð á donskum, men hvat er tað ikki ófantaligt á føriskum. Tað kann jú eita nakað so vakurt sum vakra, fagra, fríða, væna, eiggiliga, undurfagra, men smukke! Hvat hugsa fólk fyri sær? Stundum er – gud hjálpi tú mær – at lesa sum undirskrift »svigerfar«, »svigermor«. Hví rætta tit ikki slíkt tvætl á Sosialinum ella vita tit kanska ikki betur. Vita hesi menniskju veruliga ikki, at á føriskum eitur tað nakað so stutt og vakurt sum verpápi ella verfaðir, vermamma ella vermóðir (versonur, verdóttir, svágur, mágur).

Mangan hevur man undrast á hatta tunga og ótrúliga mishátta orðið »frumframførsla«, í fyrstuni trúði eg, tað varð sagt í skemti og minti nógv um remsuna trumm trumm trallalei, men dekan fari hevur tað víst seg at vera tað rama álvara. Vælsigna hann eigi tykkum gloymið hatta ljóta og tvørliga orðið og goymið tað burtur. Nýtið heldur orðið premiera.

Synd og mishátt er eisini at hoyra fólk siga »yvirbevístur«, tá ið vit nú hava eitt so vakurt orð sum »sannførdur«.

JPH

152	VINNARI	METAL	LIVDI	NORGE	LITIR	ÍFYLLA	LEIÐARI	DRÍVI	STABBA-NAVN	STAÐ Í WALES	OXY-GEN	GÓÐI	SANG-BOLKUR	FIMTAN ÁR	GUÐUR	
VINNARI									1							JAP. SKEMNI-VIN
MANNI				ÁSKRIFT / URAN		BÆKA-HILL					HABUR / SLIGIN		2			
GULL						STABBA-NAVN / SKIP									ALFA / PLANTA	
SJÓ-MIL			GÁTA / HAVN	HABUR / SVII									GRANL. BYGD	GL. KEMPAR		
LAND								FLØST / TAPARA-FLOKKAR		BRACKUR / VESTA UMFAR						
HABUR					RÁS / ONKUR				TSNI / VOLT	3		PRE-POSIT. / KONA			PLANTAN	TYKUR
SINUS				HAKKOV / HABUR		ÓVISSA	HEILSANN ELEKTRO FIRMA	4						UN / REYÐUR		
KONA							5	ÍTALIA	HANNI / TÁNNIR							
	1002 / STEMMA				BLAKT-RAR				6					HÆT / SLEYÐIR IN		
ABER-DEEN		HOLLAND / STÓR Á			TYSKT FIRMA / NEON	7		SEKS / KARBON			ÍFYLLA	HIMAR / GAMLA UPPÁ -?				HABUR-IN
DRYCKUR			"HÁTI" / FANDEN HEIT			STREYM-URIN	VERTÍMA / TONS									8
FERÐA-SKJÓTTA								KRAFT-VERK / "EYSTUR"		9						
VESTAN-FYRI			PRIMA	KONA	TVÍTJÓÐ		GRUNDIN			10					VESTUR / FÁI MÆR	
BYGÐ				11			NULL / KUTETIKA		VOLT / KEFLA-VÍK		EINS / MELS JUNI			ELI NIELSEN / PLUSS		
ÍFYLLA		12	TVÍTJÓÐ / KALIUM		VREIÐIN / DANSK OYGGJ								ROMAR-TAL	FLYTI / NITRO-GEN		
KVALO-ÁRSEIÐIÐ										13						

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Jóhanna Jørgensen
í Heiðum
370 Miðvági

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: SEINASTA OLJAN

O	L	J	U	Æ	V	I	N	T	Ý	R	S	S	Ø	Ó	N
L	I	A	S		Á	R	A	R	L	U	M	M	U	R	
J	E	N	A	G	L	A	S		I	F		Á	N	A	R
U				L	A		A	K	R	U	M		K	R	Á
Ð	A	N	M	A	R	K		R		S	Á	R	A		
Á	T	T	A	T	I	Á	L	I	N		N	Æ	R		S
L	A		N	I		R	I	T		G	I		I		M
K	C	L		N		A	B		K	Y	N		N	O	Y
I	A	N		G	O	S	I		R			E		K	R
N	M		G	I	R	O	Ð	E	I	L	Ð	I	N		J
G	A	B	O	N		N	O	R	S	K	A	R		P	I
A		E	R		S			A	T		Ð	E	R	E	K
R	O	T	B	I	N	G		S	I	G	Ð		A	L	A
V	A	R	A	V	A	R	A	M	A	Ð	U	R		L	N
A	S	A		I	R	A		U	N			E	Ð	E	N
151	A	N	A	N	A		Á	S	M	U	N	Ð	I		A

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: 152

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.